LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 28. august 2019
J.Nr.: LUM-11- 18/00113-33
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um drúgva málsviðgerðartíð hjá Klaksvíkar kommunu av innlitsáheitan frá Kringvarpi Føroya.

Við skrivi, dagfest 13. november 2018 hevur Kringvarp Føroya sent umboðsmanninum klagu um, at Klaksvíkar kommuna ikki hevur avgreitt eina áheitan um innlit í skjøl og samskifti um kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorgi.

Tann 16. oktober 2018 sendi Kringvarp Føroya soljóðandi teldupost til Klaksvíkar kommunu:

> " Hervið verður biðið um innlit í málið um niðastu hædd á Biskuptorgi, har handlar eftir ætlan skuldi leiga.
>
> Biðið verður um innlit í innlitsumbønina og svarini frá B um sama mál. Eisini verður biðið um innlit í samskifti millum D og Klaksvíkar kommunu í sama máli, og hvat kostnaðurin er fyri niðastu hædd er ella verður fyri kommununa, beinleiðis ella óbeinleiðis."

**Málsgongd**

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 13. november 2018, varð klagan send Klaksvíkar kommunu til ummælis við soljóðandi skrivi:

> "**Viðvíkjandi klagu frá Kringvarpi Føroya v/ A, journalisti**
> Umboðsmaðurin hevur fingið eina klagu frá A, journalisti í Kringvarpi Føroya um, at Klaksvíkar kommuna ikki hevur avgreitt áheitan hennara um innlit í skjøl og samskifti um kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorgi. Avrit av klaguni er hjálagt.

Sambært samskiftinum millum klagaran og Klaksvíkar kommunu, sum klagarin hevur sent saman við klaguni, váttar kommunan móttøkuna av innlitsáheitanini sama dag, sum hon er móttikin, 16. oktober 2018, og eina viku seinni, tann 23. oktober 2018, boðar kommunan klagaranum frá, at innlitsáheitanin er gingin á møti, og at nú vantar bert at flýggja henni skjølini.

Síðani eru 3 vikur gingnar, og kommunan hevur tvær ferðir síðani svarað klagaranum, at innlitsáheitanin væntandi verður avgreidd í "komandi viku". Innlitsáheitanin er ikki avgreidd enn.

Umboðsmaðurin hevur gjørt av at kanna hetta málið nærri. Klaksvíkar kommuna verður í hesum sambandi biðin um at greiða umboðsmanninum nærri frá handfaringini av hesum máli, her ímillum greiða frá, hvussu nógv skjøl, tað snýr seg um, og um orsøkina til, at tað tekur so drúgva tíð at avgreiða innlitsáheitanina, tá støða longu er tikin til, at hon verður gingin á møti.

Klaksvíkar kommuna verður eisini biðin um at lata umboðsmanninum til láns øll skjøl (original ella avrit) viðvíkjandi málinum, t.e. samskifti við klagaran og tey skjøl, sum biðið er um innlit í, umframt skjalayvirlit.

Biðið verður um, at frágreiðingin er umboðsmanninum í hendi innan 1 viku."

Tann 16. november 2018 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"**Svarskriv - Klaga um innlitsmál um kjallaran á Biskupstorgi**
Vísandi til áheitan frá Løgtingsins Umboðsmanni um frágreiðing um viðgerðina av máli um innlit í ... *Innlit i skjøl og samskifti ísv. kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorg v.m. - B*, dagfest 13. november 2018, tykkara j.nr. 18/00113, verða við hesum send frágreiðing, skjalayvirlit og viðkomandi skjøl.

Fyrst av øllum er at siga, at tað harmar okkum sera nógv, at borgarin hevur bíðað so leingi eftir svari frá kommununi. Orsøkin til drúgvu bíðitíðina er millum annað hon, at vit hava gjørt broytingar í mannagongdini fyri, hvussu vit handfara innlitsmál. Hetta er gjørt, eftir at vit hava havt trupulleikar við at avgreiða innlitsmál, sum Løgtingsins Umboðsmaður er væl vitandi um. Vit hava arbeitt miðvíst við at fáa avgreitt eldru innlitsmálini, og tað tekur tíð hjá øllum avvarðandi at tillaga seg nýggju mannagongdirnar. Vónandi verður borið yvir við okkum.

Tað var møguliga ein feilur, at A fekk at vita, at innlit fór at verða latið, tí málið, hon bað um innlit í, ikki var liðugt avgreitt. Kanska skuldi hon havt fingið at vita, at vit arbeiddu við innlitsmálinum, sum hon bað um innlit í, og tí fór avgreiðslan av hennara umbøn at taka longri tíð.

Ein onnur orsøk til, at hendan innlitsviðgerðin hevur tikið drúgva tíð, er, at innlitsspurningurin mátti viðgerast í nýggjum ljósi. Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku, og ikki Klaksvíkar kommuna, stendur fyri byggingini, talan er um, og í tí sambandinum er løgfrøðiligur spurningur settur við, um tað eru skjøl hjá Kráarbrekku, sum innlit skal latast í.

Talan er um 155 skjøl. Leinki til skjølini er viðheft teldupostinum umframt skjalayvirlit.

Gongdin í innlitsmál: ... Alment innlit í mál ... ísv. kjallaran i íbúðarbyggingina á Biskupstorg v.m. - B) - KVF A)

16-10-2018, skjal 1: Umsókn um innlit frá KVF (A)
16-10-2018, skjal 2: Móttøkuváttan send KVF (A)
23-10-2018, skjal 3: Fyribils svarskriv til KVF (A)
23-10-2018, skjal 4: Fyrispurningur um góðkenning frá borgarstjóranum
01-11-2018, skjal 5: Áheitan frá KVF (A) um at fáa svar uppá innlitsumbøn
02-11-2018, skjal 6: Kunning til KVF (A) um, at innlitsmálið verður væntandi klárt í komandi viku.
13-11 -2018, skjal 7: Fyrispurningur um góðkenning frá borgarstjóranum (skjøl løgd fysiskt til borgarstjóran at góðkenna; hetta sæst ikki í málinum)
15-11-2018, skjal 8: Skjøl, ið innlit er latið í (frá OneDrive leinkju) (góðkenning fingin frá borgarstjóranum)
15-11-2018, skjal 9: Innlitssvar sent"

Í skrivi, dagfest tann 19. november 2018, ger Kringvarp Føroya Klaksvíkar kommunu varugan við, at innlit er givið í skeivt mál. Skrivið er soljóðandi:

"Nú havi eg downloadað skjølini, og her er kanska okkurt mistak hent, tí eg síggi bara skjøl um sjóhitaskipanina.
Tað, sum eg vil hava innlit í, er aktuella málið um niðastu hædd í Biskupstorgi, har kommunan ætlaði at leiga út til handlar, men har sjálvsognarstovnurin nú hevur tikið um endan.
Tað vil siga, at eg sóknist eftir innliti í:
1) samskiftið millum Klaksvíkar kommunu og D um niðastu hædd í bygninginum, sum viðvíkur leigumálum
2) innlit í samskiftið millum Sjálvsognarstovnin og Klaksvíkar kommunu um niðastu hæddina í bygninginum
3) innlit í samskiftið millum sjálvsognarstovnin og D um niðastu hædd í bygninginum.
4) journalyvirlitið í málinum.
Nú tað frættist, at Kommunala Eftirlitið er komið inn yvir málið, vil eg eisini biðja um
5) innlit í samskiftið millum Klaksvíkar kommunu og kommunala eftirlitið í hesum aktuella málinum."

Tann 28. november 2018 vórðu viðmerkingarnar hjá Klaksvíkar kommunu sendar klagaranum til ummælis. Sama dag sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til Klaksvíkar kommunu:

"**Viðvíkjandi klaguni frá Kringvarpi Føroya v/ A, journalisti**

Tann 13. november 2018 sendi umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu avrit av eini klagu frá omanfyri nevndu um, at Klaksvíkar kommunu ikki hevði avgreitt innlitsáheitan hennara um innlit í skjøl og samskifti um kjallaranum í íbúðarbygginginí á Biskupstorgi. Støðan í málinum var tá, at 3 vikur vóru gingnar, síðani kommunan hevði boðað klagaranum frá, at innlitsumbønin var gingin á møti, men hóast hetta hevði kommunan ikki avgreitt innlitsumbønina.

Umboðsmaðurin heitti á kommununa um at greiða nærri frá handfaringini av málinum, her ímillum hvussu nógv skjøl, tað snúði seg um, og um orsøkina til, at tað dró út at avgreiða innlitsáheitanina, tá støða longu var tikin til, at hon var gingin á møti.

Tann 16. november 2018 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av málinum, umframt skjøl. Avrit av frágreiðingini er sent klagaranum til kunningar og møguligar viðmerkingar.

Í frágreiðingini sigur kommunan, at orsøkin til drúgvu avgreiðslutíðina er, at broytingar eru gjørdar í mannagongdini fyri, hvussu innlitsáheitanir verða handfarnar, at arbeitt er miðvíst við at avgreiða eldri innlitsmál, og at tað tekur tíð hjá øllum avvarðandi at tillaga seg nýggju mannagongdirnar.

Klaksvíkar kommunu verður í hesum sambandi biðin um at greiða frá

- hvørjar umrøddu broytingarnar í mannagongdunum eru í mun til áður, og

- hvussu nógvar óavgreiddar innlitsáheitanir Klaksvíkar kommuna hevur, sum eru eldri enn 1 mánað.

Sambært frágreiðingini frá Klaksvíkar kommunu hevur gongdin í innlitsmálinum verið tann, at umsitingin tann 23. oktober spurdi borgarstjóran um at góðkenna eitt fyribils svarskriv til klagaran, at fyrispurningur aftur varð settur borgarstjóranum tann 13. november um hetta sama, samstundis sum skjøl vórðu løgd til hansara at góðkenna, og at borgarstjórin tann 15. november góðkendi at lata innlit í skjøl.

Klaksvíkar kommuna verður í hesum sambandi biðin um at greiða umboðsmanninum nærri frá,

- um tað er føst mannagongd, at svarskriv hjá umsitingini uppá innlitsáheitanir verða løgd fyri borgarstjóran at góðkenna, áðrenn tær verða avgreiddar,
- hvør orsøkin er til hetta,
- hvat endamálið við hesum er,
- um hetta leingir um avgreiðslutíðina av innlitsáheitanum (hvussu nógvar dagar), og
- um borgarstjórin í nøkrum føri heilt ella partvíst ikki hevur góðkent niðurstøðu hjá umsitingini um, at borgari ella fjølmiðil hevur rætt til innlit.

Biðið verður somuleiðis um at fáa skjølini og skjalayvirlitini í tykkara ..., ... og ..., sum eftir skjølunum at døma eru mál um innlit. Klaksvíkar kommuna verður vinarliga biðin um at

talmerkja skjølini samsvarandi skjalayvirlitinum og senda umboðsmanninum tey í fílum við hvørjum máli sær.

Tann 20. november 2018 kunnaði klagarin umboðsmanninum um, at hon hevði gjørt Klaksvíkar kommunu varuga við, at hon ikki hevði fingið innlit í skjøl og samskifti um kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorgi, sum hon hevði biðið um, men harafturímóti hevði fingið innlit í skjøl um sjóhitaskipanina, sum hon ikki hevur biðið um innlit í. Helst er talan um eini 100 skjøl. Klaksvíkar kommuna verður vinarliga biðin um at gera viðmerkingar til hetta.

Klaksvíkar kommuna hevur síðani sent klagaranum eitt skriv (*dagfest 1. nov. Skal helst vera 20. nov*.) har tað m.a. verður greitt frá, at tað er sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku, sum stendur fyri byggingini av Biskupstorgi, at samskiftið fer fram í hesum sjálvsognarstovni, og at Klaksvíkar kommunu tískil ikki er rætti myndugleiki at taka støðu til áheitanina um innlit. Tað framgongur av skjølunum, sum kommunan hevur sent umboðsmanninum, at kommunan longu 1. november var komin til hesa niðurstøðu, og spurt verður tískil, hví Klaksvíkar kommuna ikki gav klagaranum hesa grundgeving beinanvegin, tá innlitsáheitanin varð avgreidd.

Biðið verður somuleiðis um, at Klaksvíkar kommunu sendir umboðsmanninum samskiftið, sum Klaksvíkar kommuna hevur havt við uttanhýsis ráðgeva um handfaring av innlitsáheitanum í málið um íbúðarbyggingina (mál ... + skjalayvirlit).

Biðið verður um, at frágreiðingin og skjølini eru umboðsmanninum í hendi innan 3 vikur.”

Tann 11. desember 2018 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“**Svarskriv til LUM viðv. klagu frá KVF (A) um innlitsmál ...**
Vísandi til skriv dagf. 28 nov. 2018 frá Løgtingsins Umboðsmanni viðv. frágreiðing um handfaring av innlitsmálum og mannagongdum, skulu vit í hesum sambandi upplýsa fylgjandi.

I málið ... *Reglugerð fyri mannagongd í samb. við mál um almenn innlit,* er reglugerð fyri innlitsmál frá 2012, sum í 2014 var broytt soleiðis:

*2012 - Pkt. 3:* Støða skal takast til, hvør skal vera málsviðgeri... *og í reglugerðini fyri 2014 - pkt. 3 stendur at* “stjórnarskrivarin/skrivstovan " er høvuðsmálsviðgeri.

*Reglugerðin frá 2014 var broytt í 2017 til at* “stjórnarskrivarin/skrivstovan" *er broytt til* “Løgfrøðingur kommununnar er høvuðsmálsviðgeri". *Og* “journalin" *er broytt til* “journalleiðarin/postábyrgdari".

Broytingin frá 2017 til 2018 er *“løgfrøðingur"* broytt til “*journalleiðari"*, Mannagongdin er nú tann, at journalleiðarin metir, um innlitsmálið er eitt avgreiðslumál ella krevur eina

løgfrøðiliga gjøgnumgongd. Eisini verður útgreinað, hvat týdningurin av at gera málið "klárt til avgreiðslu" er.

Løgtingsins Umboðsmaður biður um samskiftið, sum Klaksvíkar kommuna hevur havt við uttanhýsis ráðgeva, um handfaring av innlitsáheitanum í málið um íbúðarbyggingina. Nevnda samskifti sæst í mál ... og skjalayvirlit er viðheft.

Spurt verður eisini til óavgreiddar innlitsáheitanir, sum eru eldri enn 1 mánað.

Í skrivandi løtu eru ongin óavgreidd innlitsumbøn, sum er eldri enn 1 mánað.

Somuleiðis verður spurt, um tað er føst mannagongd, at svarskriv hjá umsitingini til innlitsáheitanir verða lagdar fyri borgarstjóran at góðkenna, áðrenn tær verða avgreiddar.

Í reglugerðini fyri avgreiðslu av málum um alment innlit er ásett, at borgarstjórin hjá Klaksvíkar kommunu góðtekur og undirskrivar innlitsumbønir.

Spurt verður eisini, um tað kann leingja um avgreiðslutíðina. Umsitingin hevur ikki ta fatan, at tað leingir um avgreiðslutíðina. Til spurningin, hvat endamálið er við, at borgarstjórin góðkennir øll innlitssvarskriv, kann viðmerkjast, at tað hevur verið siðvenjan. Tó skal viðmerkjast, at í samband við at umsitingin hjá kommununi fyri góðum fimm árum síðan varð umskipað, hevur spurningurin verið umrøddur í samband við viðgerðini av umsitingarliga uppgávubýtinum, millum borgarstjóra og kommunudeildarstjórum. Umhugsað hevur verið at flyta hesa uppgávu frá borgarstjóranum til kommunu-/deildarstjórar.

Umsitingin er ikki vitandi um, at borgarstjórin heilt ella partvíst ikki hevur góðkent niðurstøður hjá umsitingini um, at borgari ella fjølmiðil hevur rætt til innlit.

Mál ..., ... og ... eru viðheft, og skjalayvirlitini til nevndu mál.

Í samband við at A ikki fekk skjøl og samskifti um kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorg, men fekk í staðin innlit í skjøl um sjóhitaskipanina, skal viðmerkjast, at A bað um at fáa innlit í mál hjá B. B fekk skjølini um sjóhitaskipanina, tí fekk A eisini tað tilfar tilsent. Umframt svarskrivið sum B og E (KVF) fekk.

Skjalið sum Løgtingsins Umboðsmaður vísir til, sum er dagfest 1. november 2018, er ein skabilón, sum umsitingin brúkti í samband við innlitsumbønina hjá E (KVF), um innlit í samskifti og sáttmálar millum Kk og D ísv. leigu av handilshølum á Biskupstorg. Hetta brævið er umsitingin byrjað uppá 1. nov. 2018. Tað er av óvart, at dagfestingin var verandi 1. nov. 2018. Dagfestingin skuldi vera 20. nov. 2018."

Tann 21. desember 2018 sendi umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu soljóðandi skriv:

"**Viðvíkjandi klaguni frá A, journalisti**
Klagarin hevur boðað mær frá, at hon ikki ynskir at gera fleiri viðmerkingar til hetta málið.

Eg fari tí undir endaligu viðgerðina av málinum. ...

Í frágreiðing til mín, dagfest 16. november 2018, skrivar Klaksvíkar kommuna soleiðis:

"Ein onnur orsøk til, at hendan innlitsviðgerðin hevur tikið drúgva tíð, er, at innlitsspurningurin mátti viðgerast í nýggjum ljósi. Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku, og ikki Klaksvíkar kommuna, stendur fyri bygginini, talan er um, og í tí sambandinum er løgfrøðiligur spurningur settur við, um tað eru skjøl hjá Kráarbrekku, sum innlit skal latast í."

Eg fari við hesum at spyrja, um Klaksvíkar kommuna er komin er á mál við viðgerðini av hesum spurningi.

Um so er, at Klaksvíkar kommuna er av teirri fatan, at innlitsáheitanin skal viðgerast av Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku, fari eg vísandi til § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini at heita á Klaksvíkar kommunu um beinanvegin at senda innlitsáheitanina víðari til rætta myndugleika, sum hevur dagligu umsitingina av Sjálvsognarstovninum um hendi, og boða klagaranum frá hesum."

Tann 29. januar 2019 minti umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu á málið.

Tann 21. februar 2019 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar:

"**Svarskriv ...**
*Vísandi til áheitan frá Løgtingsins Umboðsmanni um frágreiðing at viðgera spurningin um, hvør myndugleiki varðar av skjølunum, sum klagarin hevur biðið um innlit í.*

Fyrst av øllum skal sigast, at tað harmar okkum sera nógv, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur bíðað so leingi eftir einum nøktandi svari. Talan er um eina misskiljing í umsitingini, og eru vit kedd um hetta. Viðkomandi, ið frammanundan hevur havt ábyrgd av málinum, metti seg hava avgreitt málið við bæði KVF, A og Løgtingsins Umboðsmann. Vísast kann í sambandi við hetta til svarskrivið frá Klaksvíkar kommunu til Løgtingsins Umboðsmann, har Klaksvíkar kommuna vísur til løgfrøðiligt upprit frá F.

Í hesum uppriti verður útgreinað skilmarkið millum Klaksvíkar kommunu og sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku í sambandi við innlitsmál.

Undirritaða hevur síðani fingið ábyrgd av málinum, og vil hesum geva eina frágreiðing um, hvør varðar av skjølunum, ið KVF, A, hevur biðið um innlit í.

I. **Frágreiðing, hvør gevur innlit og hvør eigur skjølini**

Sum nevnt omanfyri hevur tað elvt til ivamál í umsitingini at staðfesta, nær skjøl í skjalagoymsluni hoyra til sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku og nær tað rúmast innan Klaksvíkar kommunu. Tilfarið hjá sjálvsognarstovninum er sera rúgvusmikið, og torført er at bólka hvørt einstakt skjal, hvørt tað hoyrir til Klaksvíkar kommunu ella sjálvsognarstovnin. Millum annað eru skjøl hjá Sjálvsognarstovninum, ið eru stovnaði av Klaksvíkar kommunu, sum í prinsippinum onki hava við Klaksvíkar kommunu at gera.
Hesi ivamál bóru tíverri við sær, at seinkingar vóru í avgreiðsluni av málinum, men er hesin spuningur nú viðgjørdur, og eru vit komin til hesa niðurstøðu.
Stutt skal viðmerkjast, at við støði í frágreiðingini meta vit soleiðis, at vit hava orðað ein leist at fylgja fyri slík mál í framtíðini.

II. **Viðkomandi bókmentir**

Við støði í viðkomandi bókmentum er dentur lagdur á, hvørt skjølini eru stovnaði sum liður í málsviðgerð hjá viðkomandi myndugleika, sb. § 4, stk. 1 í innlitslógini. At skjølini í hesum føri koma til skjalagoymsluna hjá Klaksvíkar kommunu, merkir ikki at tey eru móttikin ella gjørd sum ein liður í málsviðgerð fyri tann myndugleikan. Í hesum føri skal tað skiljast sum, at Klaksvíkar kommuna veitur einum øðrum myndugleika skrivstovuhjálp. Kommunan hevur í varðveitslu skjøl vegna tað, at man hevur skrivstovu vegna ein annan, sum í hesum føri er sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku. Hetta sjónarmið verður stuðlað av § 10, nr.3 í innlitslógini, sum sigur at skjøl ikki missa sína støðu sum innanhýsis, um tey verða send einum øðrum myndugleika í sambandi við at ein myndugleiki hevur skrivarauppgávur fyri ein annan myndugleika. Sostatt hevur lógin lagt upp fyri júst hesum, at ein myndugleiki røkir skrivstovuuppgávur fyri ein annan myndugleika.

III. **Heimildin hjá Klaksvíkar kommunu**

Klaksvíkar kommuna metir seg sostatt ikki hava heimild at veita innlit í skjøl hjá sjálvsognarstovninum, við denti á at innlitsumbønin er send til Klaksvíkar kommunu, og er hon í sínum innihaldi eisini stílað til Klaksvíkar kommunu. Innlitsumbønin vísur ikki til einstøk skjøl, men *biðið verður um innlit í málið um niðastu hædd á Biskopstorgi.* Við støði í hesari innlitsumbøn hevur Klaksvíkar kommuna síðani veitt innlit í skjølini, ið eru í dátugoymsluni hjá Klaksvíkar kommunu.

Ynskir Løgtingsins umboðsmaður fleiri upplýsingar, er Klaksvíkar kommuna sjálvsagt fús at svara. Eisini er kommunan fús at viðgera málið nærri, skuldi ynski verið um tað."

Tann 27. februar 2019 spurdi umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu, um hon, vísandi til skrivið frá umboðsmanninum tann 21. desember 2018, hevði vegleitt klagaran um, hvagar hon skuldi venda sær við innlitsáheitanini, um hon skuldi stílast øðrum myndugleika enn Klaksvíkar kommunu.

Tann 27. mars 2019 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "Orsøkin til at vit ikki hava sent klagaranum nærri vegleiðing er tí, at hon hevur sent innlitsumbøn sína víðari til sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, og sigast skal at hetta málið er avgreitt hjá sjálvsognarstovninum.
> ..."

Tann 29. mars 2019 bað umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu um at upplýsa, hvør rætti myndugleikin var at venda sær til við eini áheitan um innlit í skjøl hjá sjálvsognarstovninum, t.e. hvør umsat ella virkaði sum umsiting hjá sjálvsognarstovninum.

Tann 1. apríl 2019 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "Í skrivinum frá Klaksvíkar kommunu, sent til LUM 22.02.2019, verður m.a. greitt frá, at Klaksvíkar kommunu veitur skrivstovuhjálp fyri sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku. Í samband við innlitsumbønina hjá A var dentur lagdur á, at hon í sínum innihaldi er stílað til Klaksvíkar kommunu. Innlitsumbønin vísur ikki til einstøk skjøl, men biðið verður um innlit í málið um niðastu hædd á Biskopstorgi. Við støði í hesari innlitsumbøn hevur Klaksvíkar kommuna síðani veitt innlit í skjølini, ið eru í dátugoymsluni hjá Klaksvíkar kommunu.
>
> Klaksvíkar kommuna hevur eisini móttikið fleiri innlitsumbønir, ið eru stílaðar til sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, og hevur Klaksvíkar kommuna eisini avgreitt hesar umbønir vegna sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku.
>
> Í samband við fyrispurning tín, hvør er rætti myndugleikin, so er Klaksvíkar kommuna rætti myndugleikin, og er tað Klaksvíkar kommuna ið umsitur skrivistovuarbeiðið hjá sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku."

Av tí at tað ikki var mett verða neyðugt við framhaldandi partshoyring, varð farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um innlit í skjøl hjá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku í Klaksvík og um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av hesi innlitsáheitan.

Sambært upplýsingum í málinum legði fyrisitingin tann 23. oktober skjølini í málinum til borgarstjóran til góðkenningar, men ikki fyrr enn tann 15. november góðkendi borgarstjórin, at innlit varð givið í málið. Tann 19. november ger klagarin vart við, at innlit er givið í skeivt mál.

Starv og heimildir borgarstjórans eru ásettar í kapittul 4 (§§ 20 – 25) í kommunustýrislógini (løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003). Sambært § 20, stk. 1, pkt. 1, hevur borgarstjórin dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini.

Eg havi onga viðmerking til, at borgarstjórin sambært innanhýsis reglugerðini fyri avgreiðslu av málum um alment innlit hevur ásett, at borgarstjórin hjá Klaksvíkar kommunu góðtekur og undirskrivar innlitsáheitanir. Sum dagligur leiðari av fyrisitingini hevur borgarstjórin ábyrgdina

av, at fyrisitingin er virkisfør. Hann hevur eftirlit við fyrisitingini og kann krevja neyðugar upplýsingar av henni. Sum ovasti leiðari fyri kommunalu fyrisitingina kann hann tó ikki uttan sakliga orsøk gera av, hvussu mál skulu avgreiðast ella geva starvsfólkum boð um, hvussu mál skulu avgerast. Leiðsluábyrgdin heimilar heldur ikki borgarstjóranum at broyta fyrisitingarligar avgerðir ella at seinka avgreiðsluna av einum máli.

Hóast kommunan í svarskrivi sínum til mín sigur, at umsitingin ikki er vitandi um, at borgarstjórin heilt ella partvíst ikki hevur góðkent niðurstøður hjá umsitingini um, at borgari ella fjølmiðil hevur rætt til innlit, so er mannagongdin hjá kommununi óheppin, tí tað ganga 23 dagar frá, at fyrisitingin hevur lagt málið til borgarstjóran, til hann skrivar undir innlitsáheitanina. Hetta er als ikki nøktandi. Eg haldi heldur ikki, at tað er nøktandi, at tað ganga 30 dagar frá, at søkt verður um innlit, til innlit verður latið í partar av tí umbidna tilfarinum, og at klagarin í hesum sama tíðarskeiði tvær ferðir hevur fingið at vita, at innlitsáheitanin væntandi fer at verða avgreidd í tí komandi vikuni.

Sambært § 16, stk. 1, í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum) skal myndugleikin sum skjótast gera av, um ein innlitsáheitan kann verða gingin á møti. Í § 16, stk. 2 er ásett, at um støða ikki er tikin til innlitsáheitanina innan 10 dagar, frá tí at hendan var móttikin, skal myndugleikin boða umsøkjaranum frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals. Endamálið við hesum reglum er at tryggja eina skjóta viðgerð av innlitsáheitanum, tí tað sum oftast er týðningarmikið fyri bæði borgarar og fjølmiðlar at fáa skjalainnlit í eitt mál so skjótt sum gjørligt. Fæst innlit ikki sum skjótast, kann endamálið við at biðja um innlit missa sítt tíðarbæri.

Kommunan umber seg við, at orsøkin til, at klagarin ikki fekk skjøl og samskifti um kjallaran í íbúðarbyggingini á Biskupstorg, var tí klagarin bað um at fáa innlit í mál hjá B. Eg havi torført at skilja, at um kommunan hevði ta fatan, at talan bert var um somu skjøl, kundi hetta verið avgreitt beinanvegin, og ikki bíða í 8 dagar, áðrenn borgarstjórin fekk málið til góðkenningar.

Í svarinum til mín harmast Klaksvíkar kommuna um, at ein borgari skal bíða so leingi eftir svari frá kommununi. Til hetta er at siga, at her snýr tað seg ikki um ein borgara, men um ein fjølmiðil, sum hevur ein serligan áhuga í at fáa lýst mál av almennum áhuga so skjótt sum gjørligt, meðan málið er tíðarbært. Hetta havi eg áður víst kommununi á í áliti 18/00070.

Klaksvíkar kommuna var av teirri fatan, at innlitsáheitanin skuldi viðgerast av Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku. Tí heitti eg vísandi til § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini á Klaksvíkar kommunu um beinanvegin at senda innlitsáheitanina víðari til rætta myndugleika og boða klagaranum frá hesum. Av tí at Klaksvíkar kommuna er komin til ta niðurstøðu, at innlitsáheitanir, ið eru stílaðar til sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, framyvir verða avgreiddar av Klaksvíkar kommunu, geri eg ikki meira við henda spurningin.

Samanumtikið fari eg at geva Klaksvíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum innlitsmáli.

Av tí at klagarin nú hevur fingið svar frá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku uppá áheitanina um innlit, geri eg, burtursæð frá omanfyristandandi átalu og viðmerkingum, ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður